# Semja

# millum

# Felagið Maritimir Lærarar

# og

# Fíggjarmálaráðið

## 1. Sáttmálaskeið

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2024 til 1. oktober 2025.

## 2. Lønarhækkan

Tann 1. oktober 2024 hækkar mánaðarlønin 4,75 %.

## 3. § 20 Eftirløn - dagføring

§ 20, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Í eftirløn verða goldin 15% av lønini eftir § 19, stk. 1. Starvsfólk, sum eru tímalønt, hava rætt til 15 % í eftirløn."
§ 20, stk. 5 verður strikað. Stk. 6, 7 og 8 verða hereftir stk. 5, 6 og 7.

## 4. § 6 Barnferð – dagføring

§ 6 verður orðað soleiðis:
Lærari, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
Stk. 2. Lærari, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann lærari fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær lærari farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis verða bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.
Stk. 3. Prógvar lærari við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og lærarin hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.

Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann lærari fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.
Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar vikurnar kunnu liggja innan fyri alt farloyvistíðarskeiðið eftir 14. viku. Hetta er galdandi fyri børn fødd 1. oktober 2024 og seinni.
Stk. 6. Lærarar, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.
Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava lærarar rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

**5. Annað**

Miðað verður eftir til næstu samráðingar at viðgera ásetingar um
1) Leiðaraviðbót og
2) eyka samsýning fyri skitið arbeiði

*Í Tinganesi tann 12. mars 2025*

| | |
|---|---|
| ***Felagið Maritimir Lærarar*** | ***Fíggjarmálaráðið*** |
| *Niels Johannessen*<br>*formaður* | *Ruth Vang*<br>*landsstýriskvinna* |
| *Viggo Johannesen*<br>*kassameistari* | *Marjun Jacobsen*<br>*fulltrúi* |